UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐHARRIN
MINISTER OF FOREIGN AFFAIRS AND CULTURE

Þórdís Kolbrún R. Gylfadóttir

Uttanríkisráðharri

9. desember 2021

Frú Uttanríkisráðharri,

Eg loyvi mær at vátta bræv tygara, dagsett hin 8. desember 2021, sum ljóðar soleiðis:

"Eg loyvi mær at vísa til samráðingar millum føroyska og íslendska fiskimálaráðharrarnar um fiskiveiði í føroyskum og íslendskum sjógvi í 2022.

Eg havi skilt, at semja er um fylgjandi:

"Semja
millum Ísland og Føroyar
um fiskiveiði í íslendskum og føroyskum sjógvi í 2022

6. gr.

Veiðiheimildirnar hjá føroyskum nótaskipum í lodnuvertíðirnar 2021/2022 verða 30 túsund tons, um heildarlodnukvotan er meir enn 500 túsund tons. Er heildarkvotan 500 túsund tons ella minni, verður parturin hjá føroyskum skipum 5% av heildarkvotuni.

Loyvt er føroyskum skipum at landa veiðina til framleiðslu í Íslandi. Verður heildarlodnukvotan minni enn 500 túsund tons, er loyvt at landa til matna uttan fyri Ísland ella at virka til matna um borð á føroyskum verksmiðjuskipum nøgd, sum svarar til ¾ av kvotuni hjá føroyskum skipum, sbr. 1. Grein. Verður heildarkvotan har aftur ímóti størri enn 500 túsund tons, er ikki loyvt at landa til matna uttan fyri Ísland ella at virka til matna umborð á føroyskum skipum meira enn 2/3 av av føroysku kvotuni, sbr. 1. Grein. Eftir 17. Februar skal ikki meira enn 1/3 av samlaðu føroysku

Ministry of Foreign Affairs and Culture • Tinghúsvegur 5-7 • BOX 3279 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo

kvotuni fara til matna uttan fyri Ísland ella verða virkaður til matna umborð. Eftir 17. Februar fer nøgdin, ið loyvt er at landa til matna uttan fyri Ísland ella at verða virkað til matna umborð, ikki undir 4.000 tons, hóast henda nøgd er størri lutfall enn 1/3 av tí føroysku lodnukvotuni.

Føroyskum skipum er í lodnuvertíðini 2021/2022 loyvt at veiða upp til 10.000 tons av lodnu í íslendskum búskaparøki við veiðiheimildum, sum eru fingnar við samráðingum millum Føroyar og Grønland.

2. gr.

Føroyskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í íslendskum búskaparøki í 2022. Eftir samráðingar við landsstýrið í Føroyum kunnu íslendskir myndugleikar áseta mest loyvda tal av skipum, sum kunnu veiða samstundis á leiðini.

3. gr.

Íslendskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í føroyskum sjógvi í 2022. Tó kunnu ikki fleiri enn 15 skip verða á svartkjaftaveiðu samstundis í føroyskum sjógvi. Føroyar skila sær rætt til at avmarka talið av íslendskum svartkjaftaskipum, um tað gerst ov trongt á fiskileiðunum. Eftir samráðingar við íslendskar myndugleikar kann Føroya landsstýri áseta mest loyvda tal av skipum, sum kunnu veiða samstundis eftir norðhavssild.

4. gr.

Íslendskum skipum er loyvt at veiða upp til 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi í 2022.

5. gr.

Føroysk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í íslendskum búskaparøki, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri íslendsk skip um reiðskap og fiskileiðir. Íslendsk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í føroyskum sjógvi, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri føroysk skip um reiðskap og fiskileiðir. Skipum, ið veiða eftir svartkjafti, er ikki loyvt at hava reiðskap til botnfiskaveiði um borð.

6. gr.

Partarnir skulu fráboða ein lista yvir tey fiskifør, sum ætla at veiða á økjunum hjá hvørjum øðrum. Bert tey fiskifør, sum eru á hesum lista, hava loyvi at veiða á økjunum. Áðrenn fiskiskapurin byrjar, skulu avvarðandi myndugleikar hava boð um navn á skipi saman við øðrum upplýsingum

av týdningi. Skipið skal boða frá, tá tað kemur á veiðiøkið, uppgeva knøttstøðu og veiðinøgd, sum er veidd, áðrenn komu á økið, og síðani uppgeva knøttstøðu og veiði hvønn dag. Tá skip fer av veiðiøkinum, skal mett veiða verða givin upp. Nágreiniligari ásetingar um fráboðanir verða ásettar í kunngerð."

Eg loyvi mær at staðfesta, at tað, ið stendur omanfyri, er í samsvar við fatan Føroya landsstýris, og semjan fær gildi fyribils í dag og endaliga, tá boðað er frá, at stýrisskipanarligu krøvini hjá hvørjum landi eru uppfylt.

Við hávirðing

Jenis av Rana
*landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum*

Ministry of Foreign Affairs and Culture • Tinghúsvegur 5-7 • BOX 3279 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo